## Løgreglan skal sleppa at lurta

Ein møguleiki, Annika Olsen arbeiðir við í royndunum at basa rúsevnasmuglingini, er at geva løgregluni størri heimildir at eygleiða fólk og til at lurta eftir telefonum og fartelefonum.

- Hesar møguleikar hevur løgreglan ikki í dag

Jenis av Rana mælir til, at Annika Olsen beinleiðis setir ein vanlukkubólk á stovn við einum umboði úr hvørjum politiskum flokki, ið skal hava til høvuðsuppgávu at berjast ímóti rúsevnum og at koma við tilmælum um, hvørji tiltøk skulu setast í verk.

Hann mælti eisini til at útvega fleiri hassjhundar, so at smuglarar aldrin kundi føla seg tryggar, tá ið teir koma til landið.

Floksfelagið hansara, Bill Justinussen bað hana eisini umhugsa eina skipan, tey hava í øðrum londum. Og tað er, at fólk, sum melda rúsevnasmuglarar og seljarar, fáa peningaliga virðisløn afturfyri.

Tórbjørn Jacobsen helt, at vit eiga at seta eina kanning í verk fyri at kanna út í æsir, hvat tað er, sum ger, at tørvurin at doyva seg við rúsevnum, alsamt veksur.

Annika Olsen aftur-vísti ongum av hesum.

- Eg haldi, at vit eiga at taka øll amboð í nýtslu, tí í einum lítlum samfelag, sum okkara, skal so lítið til, áðrenn ungdómurin fer fyri skeyti.

Serliga helt hon, at uppskotið hjá Tórbjørn Jacobsen var skilagott, tí tað kundi givið okkum eina greiða mynd av orsøkini til misbrúkið.

Avleiðingarnar av rúsevnamisnýtslu eru vanlukkuligar, bæði fyri einstaklingin, fyri familjuna og fyri samfelagið.

# Annika í hernað ímóti smuglarum

**RÚSEVNI** Annika Olsen ætlar at taka øll vápn í nýtslu at forða fyri, at rúsevni verða smuglað til Føroyar, tí hon heldur, at støðan er skelkandi

Áki Bertholdsen



*Annika Olsen heldur, at vit eru á veg ímóti eini vanlukku og landsstýriskvinnan í innlendismálum ætlar at seta øll segl at forða fyri, at rúsevni verða smuglað til Føroya*

*Tilgjørd mynd: Álvur Haraldsen*

- Gongdin er ræðandi og nú skal nakað gerast.

Annika Olsen er ikki sørt skelkað av, hvussu umfatandi smuglingin av rúsevnum er til Føroya.

Hon sigur, at fyrr var tað mest hassj, sum varð smuglað til Føroya, men eftir teimum upplýsingum, hon hevur frá løgregluni, hevur tað vundið meiri og meiri upp á seg hesi seinastu árini, at smugla sterkari rúsevni til landið.

- Løgreglan sær meiri og meiri til sterk evni sum amfetamin, metamfetamin, sum er upp aftur nógv sterkari, umframt kokain, ekstasy og heroin.

Tað, sum ræðir landsstýriskvinnuna mest av øllum, er, at hon stúrir fyri at tað er bara toppurin av ísfjallinum, sum vit síggja.

- Smuglararnir verða alsamt snildari og tí er vandi fyri at løgreglan bara fær hendur á einum lítlum brotparti av tí, sum kemur til landið.

Sostatt stúrir hon fyri, at trupulleikin er nógv størri enn tað, sum kemur fram í ljósmála.

- Smuglingin av rúsevnum er farin at líkjast eini vanlukku fyri samfelagið, tí fólkatalið er so lítið, at tað

- Í veruleikanum eiga vit at taka øll vápn í nýtslu, sigur hon.

Í hesum sambandi leggur hon stóran dent á at geva løgregluni nógv betri umstøður at kanna brot á lógina um rúsevnum.

Hon staðfestir, at á hesum øki eru vit langt aftanfyri okkara grannalond.

- Okkara løgregla hevur nógv verri umstøður at uppklára brot á lógina um rúsevni enn løgreglan í okkara grannalondum

- Í hesum samandi eru Føroyar næstan at meta sum

## Vit skulu ikki vera eitt smørhol fyri smuglarar

skulu ikki stórar nøgdir til fyri at beina fyri einum heilum ættarliði av umgdómi, sigur hon.

Nú ein dagin fingu tinglimir og landsstýrisfólk høvi at kjakast um støðuna viðvíkandi rúsevnum í Føroyum eftir at Jenis av Rana hevðu spurt landsstýriskvinnuna, hvørji tiltøk, hon ætlar at seta í verk at forða fyri, at rúsevni verða smuglað til landið.

### Nógv verri umstøður

Tað skilst á henni, at hon ætlar sær rættiliga í hernað ímóti smuglingini og í hesum sambandi arbeiðir hon við fleiri møguleikum.

## Gongdin er skelkandi

eitt svart hol og her skal okkurt henda, tí vit skulu ikki verða eitt smørhol fyri rúsevnasmugling, leggur Annika Olsen dent á.

aki@sosialurin.fo

## Lætt at verja Føroyar

*Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður, undrast á, at tað eru so nógv rúsevni í landinum, sum fráboðað er. Hann heldur nevniliga, at Føroyar átti at verið eitt léttasta landið í verðini at vart ímóti rúsevnum, tí møgulekarnir at koma til landið eru so fáir.*

*- Tað eru bara tveit mátar at fáa rúsevni til Føroyar og tað er við flogfari og við skipi. Øll, sum koma við flogfari, skulu ígjøgnum eina og somu hurð vesturi í Vágum og tey flestu skipini leggja at á Bursatanga.*

## 16 ár

Seinastu árini eru fleiri tiltøk sett í verk í eini roynd at basa smuglingini av rúsevnum. Eitt nú eru revsingarnar munandi harðari nú. Fyrr bar ikki til at fáa meiri enn 10 ár í fongsul fyri at bróta lógina um rúsevni, nú kann revsingin verða heilt upp í 16 ár í fongsul. Annars er løgreglan við í SSP, sum er samstarv ímillum skúla, almannaverk og løgregluna og í PSP, sum er samstarv ímillum løgreglu, almannaverk og heilsuverkið. Endamálið við hesum samstarvi er at fyribyrgja, at ung koma í óføri av rúsevnum, rúsdrekka og øðrum ólógligum. Somuleiðis hevur Annika Olsen eisini lagt uppskot fyri Løgtingið at gera eina DNA skráseta føroyingar, sum verða tiknir fyri lógarbrot uframt at løgreglan fær betri umstøður at rannsaka fólk kropsliga.